# Nøvn



## Bárður Jákupsson sýnir fram í Listahøllini

Í hesum døgum sýnir Báður Jákupsson, listamaður, fram olju- og vatnlitsmálningar í Listahøllini á Skipasmiðjuni í Havn.

Framsýningni hjá Bárði Jákupssyni lætupp sunnuodagin, og hon verður opin fram til 13. februar. Hetta er aðru ferð, at Báður Jákupsson sýnir fram einsamallur í Listahøllini, har fleiri onnur listafólk eisini javnan sýna fram.

Hesaferð er talan um stóra framsýning av oljumálningum og vatnlitamálningum.

Framsýningin er opin fríggjadag til sunnudag frá klokkan 14 til 18 og mikudag frá klokkan 17 til 20.



# Drigið somu línu í 50 ár



Leygardagin kunnu hjúnini Anna Juul og Høgni Thomsen í Nólsoy halda gullbrúdleyp.

Hetta hátíðarhald er færri og færri hjúnum unt, men Anna og Høgni hava altíð hoyrt saman.

Tey hava upp gjøgnum árini verið nógv við í bygdarlívinum, og serliga tá dans og sang umræður, hava tey verið hollir stuðlar.

Bæði hava stóran áhuga fyri føroyskum dansi og eru fastir fúsir í upp- og niðurgangstíðum hjá dansifelagnum í Nólsoy. Eisini tá tað kemur til fólkadans eru tey bæði dyggir stuðlar, tó at tað nú eru nøkur ár síðani, at tað felagið var aktivt.

Í heila tikið seta tey mentanina høgt, og Anna er grundstuðulin undir fornminnisfelagnum í Nólsoy. Flaggskipið, Brunnhúsini, høvdu ikki verið tann dragandi megin uttan Onnu.

Høgni í sínum lag hevur verið sjónleikinum í Nólsoy trúgvur, og eigur mangar og drúgvar løtur á palli, bæði í heimbygdini og kring landið, og hóast hann ikki er nakar ársungi longur er einki at ivast í, at hann kundi verið lokkaður at tikið eitt tørn aftrat á palli.

Men fram um alt er Høgni fróðarmaður. Hann kennir væl søguna í Nólsoy og veit frá nógvum at siga. Tað veit Anna fyri so vítt eisini. Hon hevur á mangan hátt givið sítt ískoyti til mentanina, ikki minst tá tað um føroyska búnan ræður, tí hon er tiltikin seymikona.

Eitt annað, sum eyðkennir gullbrúðarparið, er teirra lítilletni. Dáma einki at gera nakað hóvasták burtur úr sær. Men fyri líkasum at undirstrika alskni til mentanina og tað forna hava tey avgjørt, at hátíðarhalda dagin í Magnusarstovu, sum er barnaheimið hjá Onnu. Hesi gomlu húsini eru varðveitt í upprunastíli og hava ofta verið karmurin um mentanartiltøk av ymsum slag.

Sum so mangur annar bygdarmaður hevur Høgni seyð sum ítriv, og tað er náttúrligt, tí hann kemur úr tí man kann kalla bóndahúsi. Og nú synirnir báðir eru floygdir og farnir av rókini, er Sjeff – hundurin av óbestemmiligum puddilslag – ein sentralur partur av gerandisdegnum.

Einki er at ivast í, at fleiri fara at nýta høvið at støkka framvið Magnusarstovu leygarkvøldið, og tað sigur seg næstan sjálvt, at tey bæði verða meiri ella minni fornermað, verður brúðarvísan ikki havd á lofti.

Eg fari í hvussu er at ynskja teimum báðum hjartaliga tillukku við gullbrúdleypsdegnum og vóni, at tey eiga mong og eydnurík ár fyri framman.

**Leo Poulsen**

# Gullbrúðarparið Thomsen í Nólsoy

Sunnudagin 29-01-61 søgdu Anna Juul Hansen og Høgni Thomsen ja til hvønn annan. Man má siga at 50 ár eru ikki 50 dagar og nógv vatn er runnið í ánni síðani tá.

Anna er dóttir til postmeistaran, Jens Hansen, og tá Jens helt gavst við posti, tóku tey bæði yvir, og hetta hevur veri eitt lívsstarv hjá teimum.

Eisini hava tey dámað væl sang og hava sungið í kóri í mong ár samstundis, sum tey hava dansað føroyskan dans, har tey hava ferðast runt, bæði í Føroyum og øðrum londum.

Høgni hann hevur siglt í nógv ár, meðan Anna hevur hildið hús í heimabygdini. Tey eru vælsignað við tveimum synum, sum báðir eru giftir, og tilsamans eiga tey seks ommu- og abbabørn.

Sigast má, at tey hava hildið sítt lyfti, tí leygardagin 29-01-11 hava tey gullbrúðleyp, og hetta verður hildið í Nólsoy í Magnusarstovu frá klokkan 17.